

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 02 - 2012

# Endurnýggja altjóða avtalu um tilbúgving

Feløgini í olju- og gassídnaðinum í útnyrðingspartinum av Evropa endurnýggja nú tilbúgvingaravtaluna, sum gongur tvørtur um landamørk. Feløg í Noregi, Stórabretlandi, Danmark, Hollandi, Týsklandi og Írlandi hava samstarvað um tilbúgving í mong ár, og henda avtala er nú dagførd og endurnýggjað. Avtalan inniber, at feløg í londunum kunnu heita á onnur feløg um at veita hjálp og stuðul tvørtur um landamørk. Talan er um eina serstaka avtalu, sum gevur góðar leiðreglur fyri, hvussu feløgini í ymsu londunum á besta hátt kunnu stuðla hvørjum í eini neyðstøðu, sigur Per Otto Selnes, serligur ráðgevi hjá OLF. Operators Cooperative Emergency Services, sum tilbúgvingaravtalan rópast, varð sett í verk í 1979 og hevur verið dagførd javnan síðani. Avtalan er bert nýtt einaferð á norska landgrunninum, men hóast hetta er tað umráðandi at hava eina rammu sum hesa. Vit hava eisini venjingar tvørtur um landamørkini, soleiðis at partarnir í avtaluni kenna allar mannagongdir, sigur Selnes við olf.no.